# Mouldi aftur á Rio Bravo

MATSTOVA

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Mouldi Manai, sum í hálvtannað ár hevur verið burtur úr býarmyndini í Havn, er nú afturkomin. Hann hevur verið í heimlandinum, Tunesia, men nú hevur hann endurkeypt gomlu matstovu sína, “Rio Bravo” í Tórsgøtu, og verður nú aftur ein partur av gerandisdegnum í Havn.

Í morgun var Mouldi gestur í morgunsendingin á Rás 2. Har greiddi hann frá síni tíð í Føroyum.

Hann kom fyrtsu ferð til Føroya í 1975. Tá vóru føroyingar ikki vanir at síggja fólk við øðrum húðarliti, og fleiri steðgaðu bilunum, rullaðu rútin niður, og gløddu eftir hesum myrka manninum.

Eftir at hava havt ymisk størv, lat hann matstovuna Rio Bravo upp. Tað var í 90’, og eingin onnur matstova var í Havnini tá – undantikið hotellini. Tað gekk sera væl, og longu í 1994 mátti hann flyta í størri høli. Tá fekk hann hendur á gomlu hølunum hjá SAJ, har matstovan framvegis húsast.

Áðrenn Mouldi fór úr Føroyum fyri hálvum øðrum ári síðani, seldi hann matstovuna. Men nú hevur hann ognað sær hana aftur, og hevur seinastu dagarnar gjørt onkrar ábøtur í hølunum.

Fríggjadagin 18. januar kl 17.00 letur Rio Bravo sostatt uppaftur, og Mopuldi leggur dent á, at tað verður í gomlum hami, við gomlu matskránni og við gamla eigaranum Mouldi Manai sum stjóra.



*Mouldi Manai hevur keypt Rio Bravo aftur frá 62 N. Hann hevur nú broytt alla matskránna, soleiðis, at tað nú aftur er gamla, vælkenda matskráin at velja úr*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

TEMPUR®
TRYKAFLASTENDE MADRASSER OG PUDER

Í januar lata vit 15% í avsláttri av øllum Tempur madrassum



TAÐ LØNAR SEG AT SOVA VÆL

Gev tær sjálvum eina betri náttarlegu

SERTILBOÐ – SPAR KR. 7.180,-

1 stk. TEMPUR Night seingjaramma 180x200 cm
2 stk. TEMPUR kombimaddrass 90x200x20 cm
2 stk. F-400 elevatiónsbotnar, 2 motorar

Í alt kr. 32.995,- (Vanligur prísur kr. 40.175,-)

SERTILBOÐ – SPAR KR. 5.080,-

1 stk. TEMPUR Day seingjramma 180x200 cm
2 stk. TEMPUR Kombimaddrass 90x200x15 cm
2 stk. FEN elevatiónsbotnar, 2 motorar

Í alt kr. 23.995,- (Vanligur prísur kr. 29.075,-)

IDEmøblar
VIT HAVA HEILT VÍST EISINI OKKURT TIL TÍN

| | |
|---|---|
| Mánadag – Hósdag | kl. 09.00 – 17.30 |
| Fríggjadag | kl. 09.00 – 18.00 |
| Leygardag | kl. 10.00 – 14.00 |

Falkavegur . 100 Tórshavn tel. 354680 fax. 354681